## Nýggjar teldur til Tofta skúla



Bygdaráðið í Nes kommunu hevur samtykt at keypa nýggjan teldu-útbúnað til Tofta skúla fyri umleið 900.000 krónur. Í hesum keypi er eisini teldur til lærararnar, soleiðis at teir eisini hava møguleika at nýta nýggja tøkni í frálæruni, sum serliga kemur til sjóndar við teimum nýggju elektronisku talvunum, sum verða brúktar ístaðin fyri ta gomlu svørtu krittalvuna. Um- og útbyggingin av Tofta skúla er nú komin so langt, at komandi mánaðirnar verður seinasta hond lagt á verkið. Skúlin skal vera liðugur tíðliga í summar, og kostnaðurin er millum 45 og 50 mió. krónur. - Hetta er nógvur peningur, men hendan íløgan var alneyðug, haldi eg persónliga, tí skulu vit menna okkum sum kommuna og fáa fólk at seta búgv her í kommununi, mugu vit hava ein góðan skúla, sum eisini er ein hornasteinur fyri framburði, sigur Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd hjá Nes kommunu, sum sjálvur er skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla.

# Al Gore til Føroya

**Fyrrverandi varaforsetin hjá Bill Clinton, Al Gore, verður høvuðstalari á einari havumhvørvisráðstevnu, sum Bitland saman við Vinnuhúsinum skipar fyri 8. og 9. apríl**

**RÁÐSTEVNA**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Al Gore er næsta heimsnavnið, sum Vinnuhúsið er við til at fáa til Føroya at halda røðu*

Vinnuhúsið hugsar stórt. Í fjør heyst hevði Føroya Arbeiðarafelag boðið fyrrverandi amerikanska forsetanum, Bill Clinton, at halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum, og nú er aftur ein heimskendur fyrrverandi politikari boðin til Føroya í somu ørindum.

Og hóast Vinnuhúsið er farið eitt stig niður, so er talan ikki um hvønn sum helst, ið nú skal halda røðu um havumhvørvið. Tað er nevniliga fyrrverandi varaforsetin hjá Bill Clinton, Al Gore, sum kemur til Føroya í apríl.

Al Gore hevur, síðani hann tapti forsetavalið móti George Bush í 2000, stríðst fyri at betra um umhvørvið í heiminum, og nú Bitland saman við Vinnuhúsinum fer at skipa fyri einari havumhvørvisráðstevnu, er tað so upplagt, at bjóða júst honum at halda røðu.

Hetta passar eisini rættiliga væl, tí Al Gore er í Írlandi beint framman undan, og kemur beinleiðis úr Dublin til Føroya.

Al Gore hevur nýtt nógva tíð og orku upp á at ávara móti veðurlagsbroytingum, sum standast av nógva útlátinum av $CO_2$, og fyri hetta arbeiðið fekk hann í fjør Nobel-friðarheiðurslønina.

Hansara sjónarmið er, at øll lond og allir einstaklingar eiga at taka ábyrgd á økinum, tí jarðarupphitingin er í ferð við at hava vanlukkuligar avleiðingar við sær.

### Granskingarmiðdepil

Ráðstevnan, sum hevur fingið heitið Trans Atlantic Climate Conference, verður hildin týsdagin 8. og mikudagin 9. Apríl, og fer Al Gore at halda sína røðu fyrra dagin.

Endamálið við ráðstevnuni er, at hon skal gerast spírin til Trans Atlantic Climate Institute, sum verður ein altjóða granskingar-, menningar- og útbúgvingarstovnur innan havumhvørvi í Føroyum. Hesin stovnur skal samskipa arbeiðið á havumhvørvisøkinum millum USA og Europa.

Í Føroyum er servitan á altjóða støði um havstreymar kring Norðuratlantshavið, og Føroyar hava sum fiskiveiðitjóð nógva vitan um veður og tilfeingi í havinum. Somuleiðis eru fleri nýskapandi átøk í landinum, sum miða eftir at minka um oljudálking, spara orku og menna varandi orkutøkni, sigur Ólavur Gregersen, stjóri hjá Bitland.

Vinnuhúsið sigur, at bara tað, at ein fyrrverandi forseti í USA og nú ein fyrrverandi varaforseti koma hendanvegin, setur veruliga Føroyar á heimskortið.

Enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu nógv atgongumerkini fara at kosta, men roknað verður við áleið sama prísi, sum tá Clinton var á vitjan.

Tað eru Føroya Banki og Eik Banki, sum verða høvuðsstuðlar, og luttakararnir flúgva til Føroya við Atlantsflogi.

## FAKTA

Albert Arnold Gore, Jr. (føddur 31. marts 1948) er amerikanskur politikari og vinnulívsmaður. Árini 1993 til 2001 var hann varaforseti nummar 45 Clinton-stjórnini í USA.

Eftir at Bill Clinton hevði sitið við valdið tvey valskeið, bjóðaði Al Gore seg fram sum forsetavalevni fyri demoktarnar. Hetta stríðið tapti hann tepurt til George W. Bush, hóast hann fekk flestar persónligar atkvøður. Í hesum sambandi munnu mong minnast hendingina í Florida, har George W. Bush nápaði sigurin, beint fyri nøsina á Gore. Eftir fleiri fínteljingar í statinum var endin, at amerikanski hægstirættur skarð ígjøgnum, og við atkvøðubýtinum 5-4, lýsti Bush vinnara og harvið eisini forseta. Og hóast mong høvdu væntað, vónað og roynt at fáa hann at stilla upp til forsetavalið 2008, hevur hann valt ikki at bjóða seg fram á hesum sinni.



*Ólavur Gregersen, stjóri hjá Bitland, Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og Magni Arge, næstformaður, á tíðindafundi í Vinnuhúsinum í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*





**Slepp undan BLÁMUSOPPI**

**- í gomlum og nýggjum bygningum**

**Nú er tað her!**
Skeið um blámusopp - 5. mars á Hotel Føroyum.

**Seinnu árini** er komin øktur áhugi fyri at vita meira um leikluttin hjá blámusoppi í sambandi við innimhvørvistrupulleikar.

**Skeiðið gevur** eina almenna innføring í og fatan av blámusoppi, umframt eitt yvirlit yvir nýggjastu granskingarúrslitini og royndirnar, sum m.a. eru grundarlagið fyri ta siðvenju, sum nú verður brúkt til bygningar við vætu- og blámusoppatrupulleikum.

**Byggja vit hús,** sum ikki halda vætuni innanfyri, velja vit rætt tilfar og sniðgeva og viðlíkahalda vit konstruktiónirnar soleiðis, at vætutrupulleikar ikki koma, ber til at skapa sunn íbúðarhús.

**Á skeiðnum verður undirvíst í** góðum byggisiði og í vali av tilfari. Vegleitt verður um, hvussu bygningskanningar verða gjørdar. Eisini verður gjørd ein raðfest viðlíkahaldsætlan, so trupulleikar við blámusoppi kunnu fyribyrgjast.

**Skeiðið vendir sær til** ráðgevandi verkfrøðingar, arkitektar, tekniskar umsitingar, byggdarnevndir og onnur, sum hava ábyrgd fyri ella áhuga í einum góðum innimhvørvi við ongum blámusoppi. Bygningsumsitingar og onnur, sum hava ábyrgdina fyri projektering, bygging og rakstri og viðlíkahaldi av bygningum.

**Skeiðleiðari er seniorkonsulent við Teknologisk Institut,** Carsten Johansen. Hann er útbúgvin timburmaður og lívfrøðingur. Hann arbeiðir við at kanna bygningar fyri vætu, fyri soppar, sum niðurbrota viðin og fyri blámusopp. Hann hevur drúgvar royndir.

**Tilmelding** fer fram á www.synergi.fo har tú kanst lesa meiri um skeiðið. Tú ert eisini vælkomin at ringja til okkara á tel. 227464.

**Fá m.a. ein topp 10 lista yvir mest vanligu brekini í nýggjum bygningum.**

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn
Tel. 22RING (227464) - Fax. 32BELL (322355)
www.synergi.fo synergi@synergi.fo skype: synergi asa